# Hvat tyngir Dimmu?

**Alfred Olsen**
*løgtingsmaður*



Tað var við stórum áhuga eg fór undir at lesa oddagreinina í Dimmu fyri mánakvøldið, sum hevði yvirskriftina "Svangaskarð ella Tórsvøllur", men eftir loknan lestur, var mær greitt, at Svangaskarð er "ein torn í kjøtinum" hjá leiðsluni á Dimmalætting, og spurningurin er, hvat er tað sum tyngir Dimmu?.

**Landsliðið.**
Er Svangaskarð ein meinbogi fyri landsliðið? Neyvan, tí var tað ikki leikvøllurin á Svangaskarði, sum gjørdi tað gjørligt, at Landsliðið kundi spæla sínar heimadystir her í Føroyum? Og er tað ikki á Svangaskarði at landsliðið hevur fingið síni bestu úrslit? Og sum skilst er landsliðið væl nøgt við tað tænastu sum teimum verður veitt á Svangaskarði, somuleiðis tey vakthavandi, eins og áskoðararnir, so tað er ikki av umsorgan fyri landsliðnum, at Dimma mælir Fótbóltssambandinum til at skrotta Svangaskarð.

**Áskoðaratalið.**
Tað vil altíð vera ymiskt og ymiskar umstøður sum hava sína ávirkað á, hvussu nógvir áskoðarar vera til dystirnar, eitt nú var Norðoyastevna leygardagin, men veruleikin hevur víst, at eru umstøðurnar og tilboðini um flutning t.d. frá Strandferðsluni tey somu til dystir á Svangaskarði sum á Tórsvølli, so er eisini fult á Svangaskarði, so tað kann ikki vera tað sum tyngir Dimmu.

**Umhvørvið.**
Umhvørvið vil altíð vera ymiskt og tað er tað eisini millum Svangaskarð og Tórsvøll, men veruleikin er tann, at teir flestu áskoðararnir koma beinleiðis til dystin og fara direkta av stað aftur, sjálvt um øll vita, at Tórsvøllur liggur í Havn og tey vita hvat Havnin hevur at bjóða, so fyri nógvar av áskoðarunum hevur umhvørvið avmarkaðan týdning, meðan dysturin á leikvøllinum er tað teir eru komnir at síggja og uppliva.

**Einans eitt stadion uppi í fjøllunum.**
Leiðarin á Dimmu hevur hug at taka synd í gestunum sum vera beindir inn á Svangaskarð, tí har er onki at bjóða áskoðarunum, einki innivist, ongastaðni at vera áðrenn dystin, einans eitt stadion uppi í fjøllunum.

Eg trúgvi ikki, at gestirnir sum komu frá Sveis høvdu kenslu av at teir vóru uppi í fjøllunum til fótbóltsdyst á Svangaskarði, sum liggur á góðum 70 metrum, og veruleikin er jú tann, at her eru ongi fjøll. Tað man neyvan heldur vera ókent hjá gestunum, at ferðingin til og frá dystum liggur um ein tíma, og tað var jú fótbóltsdystin, ið teir fyrst og fremst vóru komnir at hyggja eftir, so hetta er neyvan tað sum tyngir Dimmu.

**Stemningurin.**
Rammurnar um ein fótbóltsdyst skulu altíð vera so góðar sum gjørligt fyri at stemningurin kann vera góður, men veruleikin er tann, at jú betur tað gongur okkara landsliðið, betur verður stemningurin, so tann rætti góði stemningurin verður skaptur niðri á vøllinum og plantar seg til áskoðararnar, gongur tað væl hjá landsliðnum niðri á vøllinum, verður stemningurin millum áskoðararnar eisini góður, so betur tað gongur landsliðnum betur er stemningurin, so eg vóni at landsliðið klárar at vinna mikukvøldið, tí tá verður tað vinnarastemningur millum áskoðararnar.

**Boykotta Svangaskarð.**
Hvat er orsøkin fyri at Dimma mælir Fótbóltssambandinum at taka landsdystirnar frá Svangaskarði? Og leggja fleiri dystir í høvuðsstaðnum?

Sagt verður at hetta eigur at vera gjørt av fíggjarligum orsøkum, men hetta kann jú ikki vera høvuðsorsøkin, tí vit øll vita, at spæli og úrslitini hjá landsliðnum er tað sum fær áskoðararnar til dystirnar, næstan óansæð hvar stadion liggur.

Men fyri at landsliðið skal fáa so góð úrslit sum gjørligt, so er neyðugt at umstøðurnar hjá landsliðnum eru so góðar sum gjørligt, og fyri at skapa tær perfektu karmarnar eisini um landsliðið, hevur Tofta Ítróttarfelag nú bjóða seg til at gera eina fótbóltshøll á Svangaskarði, so rammurnar til venjingar, vinadystir og komandi landsdystir hjá landsliðnum vera so fullkomnar sum gjørligt, eins og hjá áskoðarunum.

Men Svangaskarð liggur ikki í høvuðsstaðnum, og kann komandi hallarprojekt vera tað sum tyngir Dimmu?.

Sjálvur vóni eg ikki tað er so, og ivist ikki í, at Fótbóltsambandið og Mentamálaráðið við viðgera umsóknina frá Tofta Ítróttarfelag seriøst, tí eingin ivi er um, at ein slík fótbóltshøll vil hækka støðið í føroyskum fótbólti, vil betra umstøðurnar hjá landsliðnum og áskoðarunum og gagna tí Føroysku tjóðini.

# Varðveiting av Havnini

**Jógvan Arge**
*Formaður í byggi- og býarskipanarnevnd Tórshavnar býráðs*



Tórshavnar kommuna hevur í mong ár gjørt fitt burtur úr at varðveita ta gomlu Havnina so ella so.

Til tess hevur kommunan havt eina serliga ætlan fyri býarpartin úti á Reyni, sum í dag stendur sum ein fyrimynd fyri bæði okkum og onnur.

Eitt nú íslendingar eru grønir av øvund, tá teir síggja, hvussu vit eru farin um tann gamla býin, meðan teir hava sópað so at siga allan tann gamla Reykjavík burtur.

Hetta er ein kós, sum vit ætla at halda fram, tó uttan at darva menningini av høvuðsstaðnum óneyðugt í ókomnum tíðum.

Neyðugt er at skipa hesa stevnu fyri allan býin og fáa til vega dygt grundarlag fyri teimum avgerðum, sum skulu takast.

**Gera kommunuatlass**
Hildið verður, at tann stóri vøksturin í høvuðsstaðnum fer at hava alsamt størri krøv um tættleika og ferðslumøguleikar við sær, og hetta kann aftur hava við sær, at vandi verður fyri, at sumt, sum vert er at varðveita, forferst av skundi og ósketni.

Tórshavnar kommuna er saman við Føroya Fornminnissavni farin undir undir eitt samstarv, sum hevur til endamáls at skráseta og meta um, í hvønn mun hús, býlingar, vegir og økir eru áhugaverd og verd at varðveita „á ein hátt, so hetta ikki er í andsøgn við framtíðar býarskipan og menning", sum býarskipanardeildin tekur til í einum tilmæli.

Arbeiðið miðar eftir at gera eitt upprit ella álit, sum skrásetir og lýsir tað, sum er sermerkt og varðveitingarvert lutvíst ella í heilum líki. Farið verður fram verður eftir einum altjóða royndum framferðarhátti, nevndur SAVE, sum eitt nú verður brúktur til tey sonevndu kommunuatlassini í grannalondunum.

Tey eru ætlað almenninginum, umsitingum og politikarum sum upplýsing og grundarlag at meta út frá, tá nýggjar ætlanir verða lagdar og avgerðir skula takast um broytingar - ella varðveiting.

**Gamla Havnin**
Tórshavnar kommuna hevur í mong ár havt ein post á fíggjarætlanini, sum eitur Gamla Havnin. Henda játtan hevur verið eitt av amboðunum í arbeiðnum at varðveita gamla býin við sínum húsum, túnum og gøtum.

Hendan játtan hevur serliga verið ætlað býarpartinum niðast í Havnini, men gongdin hevur víst, at tørvur eisini er á at hava somu umsorgan fyri nýggjari býarprøtum og lutum av býarpørtum longur uppi í býnum.

Tí hevur byggi- og býarskipanarnevndin tikið undir við einum tilmæli um at fara undir skrásetingar- og lýsingararbeiðið í býnum sum heild. Ætlanin er, at álitið skal verða liðugt við ársenda í 2007.

Í álitinum skal eisini greiðast frá sermerktum náttúrøkjum og fornminnum í kommununi. Álitið sjálvt skal ikki taka endaliga støðu til, hvat ið eigur at verða varðveitt, men skal leggja fram tilfar, sum politiskar avgerðir kunna takast út frá.

Aðrastaðni taka landsmyndugleikarnir lut í tílíkum arbeiði til tess at fáa tað framt í stórum sum smáum kommunum. Tórshavnar kommuna hevur vent sær til landsstýrið um at gera tað sama, men hóast landsstýrið vísir áhuga, heldur tað seg ikki kunna luttaka beinleiðis.

Tesvegna hevur Tórshavnar kommuna tikið upp á seg at rinda kostnaðin av kanningararbeiðnum við vón um at fáa til vega dygt tilfar til frama fyri skilagóða framtíðar tilrættalegging við virðing fyri søguni og fortíðini.

# Norðuratlantsbólkurin for så vidt angår Færøerne

**Sambandsflokkurin**
*Kaj Leo Johannesen*



Í farnu viku var orðaskifti í Fólkatinginum um eitt uppskot frá Norðuratlantsbólkinum har mælt var til at kanna, hvørjar fíggjarligar og politiskar avleiðingar tað fær fyri Føroyar og Grønland, um Danmark góðkennir nýggja ES-stjórnarskipanarsáttmálan.

At viðurskifti sum hava við ES at gera verða kannað, kann eingin hava nakað ímóti. Sambandsflokkurin royndi fleiri ferðir í farna valskeiði at fáa hesi viðurskifti lýst, men tað var sum at tosa fyri deyvum oyrum. Millum annað atkvøddi Tjóðveldisflokkurin hvørja ferð ímóti, at hesi viðurskifti vórðu lýst. Nú sær tó út til, at fólk eru vaknað sum við kaldan dreym.

**Kanning er gjørd**
Fyri einum ári síðani bað Norðuratlantsbólkurin forsætisráðharran seta í verk eina óhefta kanning av avleiðingunum, sum ES-stjórnarskipanarsáttmálin kundi fáa fyri viðurskiftini millum Danmark, Føroyar og Grønland. Henda kanningin bleiv gjørd, og varð almannakunngjørd í mars. Hon tekur bara støðu til tann løgfrøðisliga partin av málinum, og vísir millum annað, at stjórnarskipanarsáttmálin verður ikki galdandi fyri Føroyar og Grønland, og at hann fær ongan løgfrøðisligan týdning fyri londini. Men nú vil Norðuratlantsbólkurin hava fólkatingið at taka stig til eina aðra kanning um hvørjar politiskar og búskaparligar avleiðingar hesin sáttmálin, sum ikki er galdandi fyri Føroyar og Grønland, kortini fær fyri londini.

Hetta tykist løgið, tí Tjóðveldisflokkurin hevur fyrr verið hart ímóti, at danir definera fyri okkum, hvussu vit politiskt skulu skilja løgfrøðina, men her vendir alt øvugt.

**Vilja hava rumbul**
Sjálvsagt vil Norðuratlantsbólkurin hava spurningin um eina kanning at vera eitt fólkatingsmál, tí teirra einasta endamál við hesum er at skapa rumbul. Líkamikið hvat eitt kanningarúrslit av hesum slagnum hevði víst, so hevði Norðuratlantsbólkurin aftaná sagt, at úrslitið var ikki nøktandi. Og júst tí vilja teir hava danir og ikki føroyingar ella grønlendingar at gera kanningina. Tað eru danir, sum skulu vera lýstir sum ein forðing, og tað at Fólkatingið noktar at taka stig til at gera kanningina, kann eisini brúkast til sama endamál. - At siga, at ríkisfelagsskapurin er ein forðing.

**Vit mugu sjálvi taka stigið**
Vert er at leggja til merkis, at Føroyar og Grønland hava ikki somu støðu yvirfyri ES. Føroyar verða roknaðar sum eitt triðja-land, meðan Grønland hevur eina sokallaða OLT-skipan (oversøisk land og territorium). Tað er ikki til at skilja, hví Fólkatingið skal samtykkja at gera eina politiska kanning fyri Føroyar og Grønland. Lat okkum sjálvi gera og gjalda fyri okkara kanningar, so kann Grønland gera og gjalda fyri sínar, um teir meta, at tað er rætt fyri teir. Hinvegin so kunnu vit ikki síggja burtur frá, at vit eiga skjótt heimsmet í uppritum og kanningum sum eru gjørd fyri skattgjaldarans pening, men sum í alt ov langa tíð hava ligið til onga nyttu í skuffum og samla støv.

Latið okkum brúka okkara demokratiska rætt á Løgtingi, og um so er at ein meiriluti har vil gjalda fyri at fáa kanningar gjørdar, lat okkum so gera tað og gjalda fyri tað sjálvi.

Samstarv er vegurin fram !